## Stór veitsla í Føroyahúsinum leygarkvøldið

**Leygarkvøldið verður suðuroyarveitsla í Føroyahúsinum við borðhaldi, undirhaldi og dansi. Øll eru vælkomin til kvøldið, har Blanding úr Suðuroynni spælir við Guðruni S. Jacobsen sum gestasangara og Birgir Enni er kokkur**

VEITSLA
*dagfinn@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið er stór veitsla og dansur aftaná í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Manningin á Tvørabátinum skipar fyri, eins og gjørt var til líknandi veitslu í 2003. Tá var Torgerð Suðuroy Toastmastari. Hesaferð er tað Hans í Líðini, men møguliga berst honum frá, og verður tað tá Rasmus Magnussen.

Birgir Enni, sum júst hevur verið í Brússel og kokkast, stendur fyri matgerðini. Bólkurin Blanding úr Suðuroyni spælir; Knút Nielsen, ljómborð, Jonhild A. Nielsen, sang, Dagfinn Olsen, guitar, bass, kór, Hjalmar Magnussen, guitar, sang og kór, Neil Joensen, guitar og kór. Og væntandi verður Guðrun S. Jacobsen við sum gestasangari.

Jóannes Eidesgaard løgmaður og frú taka lut og løgmaður heldur røðu.

Dagin eftir er fernisernig, har hálvi suðuroyingurin Erik Hagmann sýnir landslagsmyndir úr Suðuroyni. Palle Jacobsen sýnir fram stórar fotomyndir úr Suðuroynni.

Øll eru vælkomin til veitslu og dans. Til ber at koma til dansin aftaná veitsluna fyri 80 krónur.

# Internordic Guide Club hildið ársfund í Føroyum



*Nakrir av luttakarunum á ársfundinum hjá IGC. Úti við 90 luttakarar vóru til ársfundin í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Í døgunum frá 14.-18. apríl 2005 skipaði Føroya Ferðaleiðarafelag fyri ferðaleiðarastevnu í samband við ársfundin hjá IGC (Internordic Guide Club), sum er felag fyri góðkendar norðurlendskar ferðaleiðarar**

FERÐAVINNA
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Umleið 70 norðurlendskir gestir vóru komnir til stevnuna hjá Internordic Guide Club, sum var í Føroyum í døgunum frá 14. til 18. apríl. IGC heldur sín ársfund skiftandi millum limalondini og er hesin skipaður sum ein stevna við t.d. work-shops, fyrilestrum og kjakfundum. Í ár varð fundurin hildin í Føroyum og í hesum sambandi varð skipað fyri útferðum og fyrilestrum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, setti stevnuna í Listaskálanum fríggjadagin, meðan sjálvur fundurin varð í Norðurlandahúsinum leygardagin 16. apríl. Fundurin viðgjørdi ymisk evni, sum ferðaleiðarar koma út fyri í sínum arbeiði. Til dømis koma útlendskir bussar higar við ferðafólki og fremmandum ferðaleiðarum, sum lítið og einki kenna til Føroyar, og kunnu hesir tí koma við villeiðandi upplýsingum um land okkara. Allir limirnir í IGC kenna til slíkar trupulleikar.

**Seinrapartin leygardagin vóru fyrilestrar:**

Jóannes Dalsgaard, Ph.D, tosaði um ferðaleiðaran sum formidlara av mentan. Jóhan Hendrik W. Poulsen, professari, segði frá um føroyska málið og Gunhild V. Michelsen, ferðaleiðari, um føroyska dansin. Limir úr dansifelagnum »Tøkum lætt« sýndu fram dansispøl, og fingu útlendsku gestirnir høvi at luttaka í føroyska dansinum aftaná.

Stevnan í Føroyum eydnaðist sera væl, sigur Hilda Thomsen, samskipari av tiltakinum. Veðrið var gott og gestirnir fingu høvi at uppliva Føroyar sum ferðamannaland á útferðunum, sum vórðu gjørdar.




*IGC-nevndin saman við føroysku umboðunum Hildu Thomsen og Ólavi Hansen (uttast t.h.) Jóhanna Hansen vantar á myndini*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*